

Effodeildin støðan

NR.	LIÐ	DYSTIR	VUNNI	JAVNT	TAPT	+ MÁL	- MÁL	+/-	STIG
1	NSÍ	13	10	1	2	41	17	+24	31
2	B36	13	7	5	1	27	14	+13	2
3	HB	13	7	4	2	20	14	+6	25
4	Víkingur	13	5	6	2	31	20	+11	21
5	KÍ	13	6	2	5	21	20	+1	20
6	TB	13	3	7	3	19	16	+3	16
7	ÍF	13	3	5	5	20	22	-2	14
8	FC Suðuroy	13	3	0	10	16	37	-21	9
9	AB	13	0	7	6	11	19	-8	7
10	EB/Streymur	13	1	3	9	10	37	-27	6

í evstu løtu vísir, at hugburðurin er góður, og at vit ikki missa mótið. Tað er gott viðføri at hava við suður á Argir, sigur Heðin á Lakjuni, sum nú er limur í lítla felagnum av spælarum, ið hava skorað hundrað mál ella fleiri í landskappingini.

Hetta er møguleikin hjá HB

B36 - HB PETUR REINERT
Sunnudagin klokkan 15.00

Síðani eftir annað umfar hevur B36 verið frammanfyri grannarnar í HB. Eftir fleiri umfør hevur fjarstøðan verið fimm stig. Nú er bara eitt stig á muni. Harvið hevur HB sunnudagin møguleika at lyfta seg framum grannan og meistaraliðið.

Mánadagin vann HB 1-0 á heimavølli ímóti ÍF. Liðformaðurin, Fróði Benjaminsen, ásannar, at spælið var einki at reypa av, men hann og liðfelagarnir eru væl nøgdir við støðuna, sum hon er. Samstundis ásannar hann, at tað er neyðugt at vinna á B36, um møguleikin at vinna FM ikki skal kámast uppaftur meiri:

– Vit eru við í toppstríðnum, men NSÍ er seks stig frammanfyri okkum. Tað ræður um hjá okkum at fokusera á okkara avbjóðingar og at vinna hvørja ferð. Og so mugu vit bara bíða og vóna, at NSÍ fer at snáva.

Tað var kærkomið, at tað eydnaðist at vinna tepurt á ÍF, og tað telur øgiliga nógv at vinna á B36, sigur Fróði Benjaminsen.

Í B36 iðra teir seg nógv um, at Jákup á Borg ikki er tøkur. Avleiðingarnar av reyða kortinum í fyrru hálvfinaluni í Gøtu eru eyðsýndar. Útvísingin kostaði sigurin, sum B36 hevði kós ímóti, tá ið liðformaðurin sá reyða kortið. Jákup var nógv saknaður mánadagin í Gøtu, og ikki minst í grannauppgerðum hevur tað týdning við royndum.

– Vit fokusera á næstu avbjóðingina. Dreymurin er framvegis at endurvinna FM heitið, og tað hava vit framvegis møguleika at gera til veruleika. Um tað ikki eydnast, so skulu vit í hvussu so er vinna europeiska luttøku. Sjálvandi eru vit uppsettir at vinna ímóti grannunum, sigur B36 málverjin Tórður Thomsen, ið eigur heimavøll ímóti HB, sum sunnudagin verður gestur á vøllinum, har tey bæði stóru havnarfeløgini venja.

Toppliðið skal siga takk fyri seinast

NSÍ - VÍKINGUR LARS MÜLLER
Sunnudagin klokkan 15.00

26.apríl legði NSÍ rygg til 5-1 tap í Sarpugerði. Sunnudagin verður nýggjur møguleiki ímóti Víkingi. Síðani grannauppgerðina fyri einum stórum mánað síðani hevur Víkingur vunnið sjey stig við málmuninum 10-8 burturúr fimm dystum, og NSÍ hevur vunnið trettan stig við málmuninum 19-3!

At pílurin framvegis vísir loddrætt uppeftir hjá toppliðnum var 8-0 sigurin við Margáir mánadagin síðsta staðfestingin av.

– Í Streymnesi vístu vit øgiliga styrki, og málini vóru framúr góð. Týdningarmikið var eisini, at verjan megnaði at halda tætt. Tá ið vit taptu stórt ímóti Víkingi vóru vit manningarliga illa fyri. Tað eru vit ikki nú. Vit ætla okkum at vinna hvørja ferð á heimavølli, og tað ætla vit okkum eisini ímóti Víkingi, sum vit kortini hava stóra virðing fyri, sigur væl nøgdi NSÍ venjarin Trygvi Mortensen.

Víkingarnir vóru vónbrotnir yvir, at tað á heimavølli endaði 1-1 ímóti B36. Víkingur er tíggju stig aftanfyri NSÍ, og liðformaðurin Atli Gregersen ásannar, at í løtuni er tað ikki aktuelt hjá teimum í Sarpugerði at tosa um FM møguleikan:

– Næstu dagarnar eru tveir sera týdningarmiklir dystir á skránni. Vit hava nú fokus á grannauppgerðini í Runavík, og síðani verður tað hálvfinalan í Gundadali ímóti B36. Um vit vinna í Runavík, so økist møguleikin fyri at røkka heiðursmerkjaplássi og harvið europeiskari luttøku, og um vit vinna í Gundadali, so verður møguleikin varðveittur umvegis finalusigur í steypakappingini at kvalifisera okkum at spæla altjóða fótbólt næsta summar. Vit vita allir, at hetta er sera týdningarmikið fyri felagið, sigur Atli Gregersen.

Kunnu enda í ongamanna landi

ÍF - TB ALEX TROLEIS
Sunnudagin klokkan 15.00

Fuglfirðingar vóru sera vónbrotnir eftir 1-0 tapið í Gundadali ímóti HB. Bartal Eliasen veit væl, hvat tað snýr seg um, um tað skal eydnast at sleppa av sjeynda plássinum. Fyrsti møguleikin er sunnudagin. Um tað eydnast at vinna fulla úrtøku á heimavølli ímóti TB, so lyftir ÍF seg framum tvøramenn:

– Tað nyttar ikki at spæla væl ímillum brotsteigarnar, um móts-støðuliðið skorar, og vit lata mál fara ígjøgnum og ikki sjálvir skora mál, staðfestir Bartal Eliasen.

Undan kappingarbyrjan varð nógv gjørt burturúr, at ÍF í Adeshina Lawal og Clayton Soares átti vandamiklasta álopsparið. Higartil hava teir báðir tilsaman skorað seks mál.

Higartil hevur TB vunnið einaferð á heimavølli og tvær ferðir á útivølli. Sjey ferðir er tað endað javnt. 1-1 á heimavølli ímóti AB var vónbrot, hóast miðvallarin Heini Mikal Mortensen ásannar, at spælið ikki hekk væl saman – serliga í 1. hálvleiki:

– Vit hava verið darvaðir av, at onkrir hava verið burturstaddir, og av at aðrir hava verið skaddir. Nú eru vit manningarliga betri fyri aftur. Vit hyggja framvegis uppeftir, og vit kunnu fegnast um, at dystargongdin aftur og aftur vísir, at hugburðurin er góður. Tíverri fáa vit oftast fyrst mál ímóti okkum, men kortini eydnast tað at svara aftur. Vit vóna, at tað í Fuglafirði skal eydnast okkum at skora fyrsta málið, og at vit so megna at halda tørn, sigur Heini Mikal Mortensen hjá TB.

JOANNES@SOSIALURIN.FO

KÍ

Ikki við: Hjalgrím Elttør (trupulleikar í lærkrikanum), Tórður Justesen og Petur Andreasen (skaddir)
Ivasamur: Sørmundur Kalsø (vøddaskaddur)

ÍF

Ikki við: Jan Ellingsgaard (Burturstaddur), Ari Ellingsgaard (Leikbann, ov nógv gul kort)
Við aftur: Áki Petersen

AB

Ikki við: Rógvi Poulsen (burturstaddur), Gert Drangastein (fóturin, 2-4 vikur), Teitur Jóannesarson (knæ, óvist)
Ivasamur: Kári Nielsen (knæ)

TB

Ikki við: Arthur Poulsen (brotið fótin, 4-5 vikur)
Við aftur: Teitur Justinussen og Rógvi Joensen

FC SUÐUROY

Ivasamur: John T. Poulsen (ryggurin)